# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Eitt fólkaræði kann ikki verja seg við ólógligum vápnum*

*(Brot úr oddagrein)*

## Vandamikil støða

Tað er í dag at kalla einki land, sum setir spurnartekin við rætt Ísraels til at verja seg móti álopum frá teimum, sum eru ímóti sjálvum statinum Ísrael. Meðan friðaravtalur eru gjørdar millum Ísrael og eitt nú Egyptaland og Jordan, so er enn eingin avtala gjørd millum Ísrael og Sýria. Sostatt er kaldigt millum hesi bæði lond. Tað er eingin loyna, at Hamas, Hizbollah fáa stuðul úr Sýria og Iran, sum eru opinberligir fíggindar Ísraels og als ikki góðtaka, at hetta land er til sum statur. Tað er tí skiljandi, at Ísrael roynir at verja seg móti dagligum álopum frá Hizbollah og Hamas. Hamas situr við stjórnarvaldinum í sjálvstýrandi palestinsku økjunum, meðan Hizbollah er ein yvirgangsfelagskapur, ið heldur til í sunnara Libanon. Eingin ivast í, at Hizbollah fær stuðul út Sýria og Iran. Serstakliga Hizbollah hevur sum kunnugt gjørt ónáðir í norðara parti av Ísrael, sum so hevur svarað aftur við bumbuálopum á støðirnar hjá yvirgangsfelagsskapinum.

Eitt er at verja seg, annað er at leypa framav. Tann framferðarháttur, sum Ísrael nýtir í stríðnum við Hizbolla er farin út um alt sømiligt mark. Bumbuálopini eru heilt úti av proportiónum, tí tey raka sivilfólkið so ómetaliga hart. Stórur partur av teimum, ið doyggja av bumbuálopunum hjá ísrelsku hermegini eru børn. Seinasta dømið var fyrradagin, tá 37 børn lótu lív í lítlari bygd har suðuri í Libanon. Uttan mun til hvørjar grundir Ísrael hevur fyri at fremja hesi álop, so kunnu álopini ikki verjast. Hesi álop eru í roynd og veru krígsbrot. Krígsbrot kunnu ikki góðtakast og als ikki, tá ið tey verða framd av einum fólkaræði. Hetta, at Hizbolla eisini fremur krígsbrotsverk er eingin umbering fyri at gera tað sama. Eitt fólkaræði kann ikki verja seg við ólógligum vápnum.

Ísrael er komið í eina ómetaliga trupla støðu. Landið hevur fingið ein stóran etiskan trupulleika og vinirnir fara av álvara at ivast. Tað er torført at skilja, hvat ið veruliga bagir og hví farið er so langt út um alt sømiligt mark. Nógv bendir á, at Olmertstjórnin í roynd og veru ikki er so sterk, sum hon letist vera. Tískil hevur hermegin fingið alt ov leysar teymar. Kreppan í Miðeystri kann bert verða loyst við politiskum miðlum – ikki við hermegi, hóast henda hermegi er ein hin sterkasta í heiminum. Besta prógvið er, at rakettálopini frá Hizbolla einki eru minkaði, heldur standa tey við og versna. Tað er bert ein politisk loysn, sum kann skapa frið. Lykilin til hesa loysn hevur USA, og so leingi USA ikki vil eina politiska loysn heldur kríggið fram, hóast t.d. ST aðalskrivarin, alt ES og tey sterkastu arabisku londini vilja medvirka til politiska loysnir. Sorgarleikurin í Miðeystri heldur fram og eitt av teimum fáu demokratisku londunum í Miðeystri, Libanon liggur í andaleypi. Hetta er ein sera vandamikil støða, ið kann enda við einum stórkríggi í Miðeystri.

**Sosialurin**

# Fólkapensjónina

## *Tann føroyska, samanborin við tí donsku*

**DITLEIF ELDEVIG**



Stórur munur á fólkapensjónini.

Fólkapensjóns stuðulin, sum liggur í "Blokkinum" verður goymdur.

Tað viðførur, at tøkur peningur ikki er til fólkapensjónina í landskassanum.

Samhaldsfasti hevur einki við fólkapensjónina at gera (AME-gr).

**AME-gr**. Arbeiðsmarknaðar EftirlønarGrunnurin er at sammeta við ATP í Danmark.

**ATP: A**rbejdsmarkedets **T**illægs**P**ension.

Arbeiðsmarknaðurin skal gjalda inn í AME-gr. Millum onnur Palliba og Marsanna, inntil tey eru 67-ára gomul. Allir fólkapensjónistar fáa eins upphædd úr AME-gr.

**Løgmaður** hevur boðað frá eini hækkan: Hjún við kr.1.744 og støk við kr.1.894 um mð.

Munurin skal aftur gerast størri millum støk og hjún. Er **ikki** hjúnarbandsvinarligt.

Sum skilst, skal hetta gerast við at økja um útgjaldið úr Samhaldsfasta og við regulering av fólkapensjónini. Vit eru afturút í fólkapensjónini, og í muninum millum hjún os støk.

**Løgtingslóg** um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl., er eins fyri støk og hjún. Tvey brúka meira enn eitt fólk í hita-vatn, hita og el.

**Frádráttarfrí** inntøkuupphædd er kr. 52.100,00 (Hjún kr. 104.200). í DK støk kr.50.800, hjún kr. 101.600. Á hesum økinum eru vit líkastillaði. Men **Ikki** í frádráttarupphæddini. Í Føroyum 60 av hvørjum 100. Í DK 30 av hvørjum 100 omanfyri loftið, sum avdráttarfrítt. Munurin er stórur. Ein forðan fyri arbeiðshugin!

**Uppskot til broytingar:**

Javnstillið og hækkið fólkapensjónina.

Hækkan av útgjaldinum úr samhaldsfasta.

Í ávísum førum eigur ikki av verða gjørdur munur á støkum og hjúnum.

Lækkan í frádráttinum, í samband við meirinntøku.

Ætla løgtingið og kunnan til føroyska fólkið.

**Rætt til fólkapensjón: Í Føroyum 67 ár, í Danmark 65 ár**

| | 2006 | | 2006 | |
|---|---|---|---|---|
| Hjún | Føroysk | | Donsk** | |
| | um mðn | um árið | um mðn | um árið |
| Grundupphædd | 6626 | 79512 | 9672 | 116064 |
| Viðbót | 4260 | 51120 | 4546 | 54552 |
| Útgjald, áðrenn skatt | 10886 | 130632 | 14218 | 170616 |

*óskattað *skattað ** gift ella maki

| | 2006 | | 2006 | |
|---|---|---|---|---|
| Hjún | Føroysk | | Donsk | |
| | um mðn | um árið | um mðn | um árið |
| Grundupphædd | 4169 | 50028 | 4836 | 58032 |
| Viðbót | 2752 | 33024 | 3868 | 58416 |
| Útgjald, áðrenn skatt | 6921 | 83052 | 8704 | 116448 |

*óskattað *skattað

# Rød Bølge

*Johan Dalsgaard*

**att: All býarverkfrøðingar wannabe**

Leggið vinarligast til merkis og legg í geyma, hvussu væl bilferðslan gongur í Havn, á t.d. ólavsøku, tá allar ljóskurvar eru sløktar.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.